# Danskur DJ vitjar Platform

**Um vikuskiftið undirheldur danskur plátuvendari gestunum á Platform. Talan er um Bad Wulf, sum fer serliga spælir tónleik úr áttatiárunum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Aftur hetta vikuskiftið hevur dansistaðið Platform í Havn vitjan úr Danmark.

Hesaferð er ikki talan um fólk úr nakrari sjónvarpsrøð, men hinvegin um Flemming Wuff, sum hevur drúgvar royndir sum plátuvendari.

Tá hann er til arbeiðis á diskotekum, kallar hann seg Bad Wulf. Hann hevur vent plátur í 15 ár, og í 10 hevur hann verið professionellur. Í løtuni arbeiðir hann hjá felag, sum umboðar eina ørgrynnu av kendum tónleikarum og øðrum undirhaldsfólki.

Bad Wulf leggur serligan dent á at spæla tónleik úr áttatiárunum. Hann var á Platform fríggjakvøldið og verður aftur leygarkvøldið.

# Seinasta kvøldið við DJ Estevez

**Kári Annand Berg gevst nú sum plátuvendari, og leygarkvøldið takkar hann fyri seg í Badmintonhøllini í Havn**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

DJ 2001 hevur nú gjørt av, at hann gevst at venda plátum.

Kári Annand Berg, sum gongur undir navninum DJ Estevez, hevur verið plátuvendari í nógv ár, men leygarkvøldið fer hann at venda plátum fyri seinastu ferð.

- Eg havi valt at gevast sum profesionellur DJ, tí eg havi rokkið øll teimum málum, sum einhvør føroyskur DJ droymir um. Krúnan á verkinum var at blíva Ársins DJ 2001, sigur Kári Annand Berg.

- Tað krevur nógva tíð, orku og ikki minst pening at verða ein rættur DJ í Føroyum, og tá tað ikki kann verða eitt fulltíðaryrki, havi eg valt at brúka tíð mína uppá gerandisyrki mítt. Samstundis slepst ikki undan, at tað at vera DJ krevur nógv av teimum nærmastu. So eg havi valt damuna og arbeiði fram um tónleikin, sigur hann.

Kári Annand Berg verður tó framvegis at hoyra í Útvarp Føroya, har hann hevur havt sínar regluligu sendingar í fleiri ár.

Leygarkvøldið 8. Sept. verður endabresturin hjá DJ Estevez, tá skipað verður fyri einum stórum DJ-showi í Badmintonhøllini í Havn.

# Clickhaze stórtrívist í donskum studio

*- Umstøðurnar her eru nógv betri, enn vit høvdu ímyndað okkum. Studio er væl útgjørt, og vit hava ein sera dugnaligan tøkning. Hann er lærdur upp av sjálvum Alan Parson, so hann dugir tíni ting, sigur Jón Tyril úr Lundgaard Studio.*



**Umstøðurnar í danska Lundgaard Studio eru betri, enn Clickhaze dugdi at ímynda sær frammanundan. Dugnaligur bretskur produsari stendur á odda fyri upptøkunum hjá bólkinum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Clickhaze hevur farnu vikuna notið gott av høvuðsvinninginum í Prix Føroyar tónleikakappingini. Bólkurin er sloppin í tað væl útgjørda Lundgaard Studio í Danmark, og har liggur væl fyri.

- Umstøðurnar her eru nógv betri, enn vit høvdu ímyndað okkum. Studio er væl útgjørt, og vit hava ein sera dugnaligan tøkning. Hann er lærdur upp av sjálvum Alan Parson, so hann dugir tíni ting, sigur Jón Tyril úr Lundgaard Studio.

Tøkningurin er breti og kallast David Hyatt.

Clickhaze hevur tikið tveir sangir upp higartil. Tað eru Frozen Lullabye og Daylight.

- Enn er ikki greitt, hvussu nógvar sangir afturat vit taka upp, tí tað veldst um, hvørt vit gera sangirnar heilt lidnar her, ella taka grundina upp, og so gera teir lidnar í øðrum studio. Tað hava vit ikki gjørt av enn, sigur Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze.

## Stórtrívast

Tað eru Mentamálastýrið og Norðurlandahúsið, sum hava syrgt fyri ferðini hjá Clickhaze til Danmarkar.

- Eg vil takka Norðurlandahúsinum og Fróða Vestergaard fyri ótrúliga góða hjálp í sambandi við ferðina hjá okkum, sigur Jón Tyril.

Føroyingar eru ikki heilt ókendir í Lundgaard Studio. Taxi var millum annað í hesum studio og tók upp stakfløguna, sum kom út við einum fótbóltsblaði hjá Sosialinum fyri tveimum árum síðani.

Clickhaze fór til Danmark fyrst í vikuni. Alt uppihaldið í Lundgaard Studio er goldið, og í hesum eru eisini roknaðar 3 máltíðir dagliga, meðan upptøkurnar fara fram. Umframt at taka upp í Lundgaard Studio, eru eisini umstøður, so bólkurin kann búgva har.

- Vit stórtrívast her, sigur ein væl nøgdur Jón Tyril.

# I AM heldur fast

**Gospelrockbólkurin er fjórðu vikuna á rað ovast á 15 teimum bestu. Clickhaze reyk út eftir einari viku við teirra nýggja sangi á listanum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

I AM hevur aftur hesa vikuna verið nummar1 á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpinum. Vakri sangurin, Friðsæla stund, er nú fjórðu vikuna á rað ovast á listanum, og í annaðkvøld skal sangurin so aftur standa sína roynd.

Týr var 10 vikur á rað ovast við teirra Ormi langa, men nú er rockkvæði dottið niður á 8. pláss og tykist verða á veg út av listanum.

All That Rain halda eisini fast um sítt pláss og hevur hesa vikuna aftur verið nummar 4 við teirra Happy When You're Gone.

Clickhaze kom í farnu viku inn á listan við Notes From The Underground, men hesin sangurin er longu farin av listanum. Hann fekk bert eina viku í hitanum.



*I AM er undan 15 teimum bestu í ÚF í kvøld á odda á listanum við teirra Friðsæla stund*

# Róin vann ikki plátusáttmálan

**Vinnararnir av stóru tónleikakappingini Hithunters eru funnir. Einsamalli føroyingurin í eksklusiva selskapinum var ikki millum vinnararnar**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Nú eru vinnararnir í stóru donsku Hithunters-kappingini, sum plátufelagið BMG, Jubii og Turborg skipaðu fyri, funnir.

Ein føroyingur náddi í finaluna, har samanlagt 10 luttakarar vóru, men hann vann ikki.

Róin Siggertson vann eitt av teimum átta innleiðandi umførunum í kappingini og var sostatt ein, sum náddi gjøgnum nálareygað.

Í finaluni mátti hann tó lúta fyri Keelian, Flair og Sofa. Tann seinasti var vinnarin av kappingini, og hesin luttakarin fór við høvuðsvinninginum, sum var ein plátusáttmáli við BMG.

Róin Siggertsson hevur tó við luttøkuni í hesi kappingini víst, at hann dugir at smíða fangandi løg, og hann er eisini frálíkur tónleikari og sangari og framleiðir sín egna tónleik.

Róin arbeiðir nógv við tónleik í føroyskum studio í Herlev, har eisini fólk sum James Olsen og Terji Rasmussen hava sína dagligu gongd.




Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Havnar Bio:
Shrek
síða 31
www.sosialurin.fo
Nr 172 fríggjadagur • 7. september 2001 • 75. árgangur • Kr. 12,00
Tórbjørn Jacobsen:
Trøllanesskjalið varð dult við vilja
síða 3

Ja!
Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

Ókeypis
Verður sent óposta𠹠Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn